LM-058/2022

Landsbanki Føroya
FAROE ISLANDS GOVERNMENTAL BANK

Tórshavn 21. feburar 2023

HOYRINGSSVAR TIL UPPSKOT TIL BROYTING Í L.LÓG UM KOMMUNUSTÝRI

Avmarking av samlaðu skuldini hjá einstøku kommununum.
Landsbankin skilur hesa lóg, sum at hon hevur til endamáls at avmarka lántøkuna hjá kommunum, so tær ikki átaka sær óforsvarliga nógva skuld, og at eitt kommunustýri ikki kann binda framtíðar kommunustýri órímiliga nógv.

Landsbankin heldur at til hetta endamál er tað rætt at kommunur kunnu brúka bæði persónsskattainntøkurnar og flytingar frá landinum við í inntøkugrundarlagið.

Býti av skatti av eftirlønarinngjøldum til kommunurnar.
Flytingarnar hjá landinum til kommunurnar umfata skattin á eftirlønarinngjøld, sum verður býttur út á kommunurnar við støði í talinum av borgarum yvir 67 ár. Hetta er ein útreiðsluútjavning sum skal gera at kommunur við nógvum eldri borgarum, skulu hava møguleika at veita sínum borgarum somu tænastu, sum kommunur við lutfalsliga fáum eldri borgarum.

Landsbankin skal harumframt gera vart við, tað serliga eru borgarar yvir 80, sum ikki eru sjálvbjarnir og sum hava røkt fyri neyðini. Hetta kemur greitt til sjóndar í teimum haldføriskanningum sum eru gjørdar. Landsbankin skal tí mæla landsstýri og løgtingi til at umhugsa at býta skattin á eftirlønarinngjøld út á kommunurnar við støði í talinum á borgarum yvir 80 ár.

Stýring av samlaða virkseminum í landinum.
Í triðja lagi skal landsbankin heita á løgting og landsstýri um at gera lóggávu, sum ger, at landsstýri betri kann stýra og javna út samlaða virksemi í landinum frá ári til ár. Til hetta er neyðugt at gera lóggávu, sum ger samlaðu íløgurnar hjá kommununum javnari frá ári til ár.

Hetta kann til dømis gerast við at áseta ein árligan samlaðan løgukarm fyri kommunurnar, har tær kunnu søkja um at koma við í alt eftir, hvør søkir fyrst við ítøkilgum og gjøgnumarbeiddum ætlanum. Tó má landsstýrið hava møguleika at loyva kommunum at fremja løgur við bráðfeingis tørvi, til dømis aftaná brimskaðar ot.

Við verandi lóggávu hava løgting og landsstýrið ongan møguleika at stýra samlaða virkseminum í landinum. Hetta er ein stórur vansi, tí landsstýrið ikki kann tryggja sær, at samlaða ávirkanin frá landi og kommunum virkar stimbrandi, tá tørvur er á stimbran, og virkar tálmandi, tá tørvur er tálman. Verandi skipan avmarkar tí møguleikarnar hjá landsstýrinum at føra fíggjarpolitik, og økir tí vandan fyri yvirhiting av búskapinum og somuleiðis vandan fyri at stribra ov lítið og harvið óætlað elva til stórt arbeiðsloysi.

Vinaliga

Malan Johansen, stjóri